# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Eftirkomarar hjá Jovinu og Hans Petur



*Vikuskiftið 22. til 24. juli var ættarstevna fyri eftirkomarar hjá Jovinu og Hans Petur Magnussen í Vági*

***Tøkk***
***Hjartans tøkk øll tit ið skipaðu fyri og fingu hesa ættarstevnu í lag. Alt var sera gott bæði í Framtíðini, VB-húsinum og ikki minst túrurin við sluppini "Johannu". Eitt minniligt vikuskifti í Vági 22. – 24. juli 2005.***

***Ættarfólk***

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Judith Weyhe** í Vági fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin klokkan 17. Jarðarferðin verður frá Frelsunarherinum leygardagin klokkan 14.
Tey, ið vilja minnast Judith, kunnu lata Eldrasambýlinum í Vági ella Frelsunarherinum í Vági eina peningagávu. Konto í Suðuroyar Sparikassa.

Kistan við **Bjarna Magnussen** ættaður av Tvøroyri búsitandi í Tórshavn fer úr kirkjugarðskapellinum leygardagin 20. august klokkan 13.00.

Kistan við **(Jonn) John Nielsen**, Hvalba, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið 19. august klokkan 19 í Missiónshúsið í Hvalba. Jarðarferðin verður leygardagin 20. august klokkan 13:30.
Tey, ið vilja minnast Jonn kunnu lata Missiónshúsinum í Hvalba eina peningagávu. Konto í peningastovnunum.

**Maja Dalsgarð** av Argjum fer til gravar úr Argja Kirkju leygardagin 20. august klokkan 14.00. Tey, ið ynskja at minnast Maju, kunna lata eina gávu til Argja kirkju ella Oasuna í Hoyvík á konto í peningastovnunum.

*Kelda: Útvarpið*

## Tøkk

Øllum tykkum mongu, sum á ymiskan hátt gleddu meg og gjørdu 75 ára dagin 1. juli so hugnaligan, takki eg hjartaliga.

**Blíðar heilsanir**
**Torleif Bech, Porkeri**

## Jarðarferð

Kistan við Judith Lilholm Nielsen,
ættað úr Havn, búsitandi í Keypmannahavn,
fer úr Husumvold Kirke týsdagin 23. august kl. 14.30.

*Familjunnar vegna*
**Bent**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi tá okkara høgt elskaði

**Jógvan Fróðin Bjørgheim Rasmussen**
vanliga nevndur Jógvan í Grótinum, Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Bergur Debes Joensen prest, Atla Rasmussen og Páll Poulsen fyri vøkur og troystarrík orð í kirkjuni og kapellinum.
Tøkk til tykkum, sum sungu og spældu so vakurt.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Heiðveig**
**Børn, svigarbørn og abbabørn**

## Takk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálptu til, tá kæri maður mín og pápi okkara

**Erik Petersen**

andaðist og varð jarðaður.

Eisini takka vit presti, kirkjutænarar og sangarum fyri stuðul og samkenslu.
Vit takka fyri blómur og kransar
og somuleiðis takka vit øllum tykkum,
sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Ebba, Ragnheiður og Hergeir**

## Tøkk

Vit takka fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Mathilda Weihe**
Selatrað

andaðist og varð jarðað.

Takk øll tit, ið hennara seinastu liviár og í sambandi við jarðarferðina á ymsan hátt hjálptu henni og okkum.

*Vegna familjuna*
**Aurora, Carl, Emilia,**
**Hans Petur og Max Cecil**